## DAGSINS MEINING

# Undan og eftir oljuleiting

Um 14 dagar verður fyrsti bororurin settur í undirgrundina – við oljuleiting fyri eygað. Tað er Statoil-samtakið, ið fer undir hesa søguligu uppgávu. Seinasta hond verður nú løgd á fyrireikingarnar. Hjá oljufelagnum, í Oljumálastýrinum og ikki minst í útgerðarhavnini í Runavík verður arbeitt nærum 24 tímar um samdøgrið – fyri at fáa alt liðugt til tíðina.

Men forarbeiðið til ta boring, ið byrjar 1. juli, hevur eisini kravt nógva orku og tíð. Fyrsti grundarsteinurin varð lagdur í 91, tá undirgrundaravtalan varð gjørd. Næsti grundarsteinurin var marknaavtalan við bretar minni enn 10 ár eftir. Og triði grundarsteinurin – síggja vit tað í einum vinnusøguligum høpi – hann verður so lagdur um góðar tvær vikur, tá fyrsta boringin byrjar.

Eftirtíðin fer so at vísa, um vit megnaðu hesa stóru uppgávu nóg væl og um oljan – um hon finst – verður til gagns og fyrimunar fyri samfelagið og komandi ættarlið. Vónandi taka vit ikki munnin ov fullan, tá vit siga, at okkara oljumyndugleikar saman við øðrum myndugleikum í landinum, hava gjørt eitt dygdargott arbeiði. Við eini kvalifiserðari leiðslu, sum hevur havt bæði bein á jørðini, hevur borið til at byggja upp eina umsiting, sum hevur megnað at stýrt gongdini út frá okkara egna tørvi og veruleika samtíðis sum man hevur funnið ta hárfínu javnvág mótvegis útlendsku íleggjarunum, sum er neyðug.

Við leitingini og møguligari framleiðslu, sum liggur fyri framman, seta vit so hol á eitt nýtt kapittul í vinnusøguni: hvussu fara nýggja vinnan og inntøkur frá henni at ávirka okkara lítla samfelag! Onkur sigur, at hetta áttu vit longu at havt hugsað meira um, meðan onnur siga, at lat okkum nú fyrst vita, um olja er her. Ikki fyrr enn tað er staðfest er tíðin komin til at fyrireika seg til nýggju avbjóðingarnar.

Í løtuni verður bíðað eftir frágreiðing, sum Fróðskaparsetrið og bretski stovnurin Menas lata gera av teimum samfelagsligu avleiðingunum frá møguligari olju. Hon kann verða ein týðandi partur av tjakinum um, hvussu vit fáa best gagn burtur úr oljuni og hvussu vit sleppa undan ringastu avleiðingunum. Eins týdningarmikið tað er at hava gjørt eitt gott forarbeiði undan leiting, er tað av stórum týdningi at seta út í kortið, hvussu vit ætla at fyrihalda okkum til tað nógva nýggja virksemið og møguligar inntøkur, ið koma í kjalarvørrinum á stórum oljufundum. Hóast hetta fyrst og fremst er ein politisk uppgáva og avbjóðing, so er hetta nakað, sum alt samfelagið Føroyar eigur at fyrihalda seg til. Tað er tað vit skulu gera í vetur, tá vit vita meira um oljuna.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerkingar til Høgna Hoydal

**Signar á Brúnni**



Nakrar fáar viðmerkingar til tað, ið Høgni Hoydal sigur við Sosialin um tað, ið eg havi borið fram í sam blað um setanina av nýggjum landssýrismanni í mentamálum:

Tá ið Høgni heldur fast við, at eg hevði góðkent tað, at annar landsstýrismaður varð valdur í mítt stað, so føli eg meg noyddan at koma við nøkrum upplýsingum, ið lýsa málið gjøllari.

Í mai mánaði í fjør var eg uttanlands. Komin heimaftur tann 29. mai fekk eg bræv frá Høgna Hoydal, dagfest 15. mai 2000, har hann umrøddi spurningin um setan av nýggjum landsstýrismanni.

Eg gjørdi skjótt av og svaraði honum upp á brævið 1. juni, har eg týðuliga og greitt segði honum mína hugsan. Eg fari at loyva mær at endurgeva nøkur brot úr brævinum, ið lýsa mína støðu í málinum.

Eg endurgevi:

»Lítið hugaligt var at lesa fyrsta brævið, ið eg opnaði, ið kom frá tær. Í stuttum sigur tú, at tær avtalur, sum eru gjørdar í SVF-málinum, ætlar tú at kveistra til viks, og nýggjur landsstýrismaður skal veljast.

Tað skal ikki vera nakað dulsmál, at eg føli meg sviknan og offraðan, ikki minst eftir at hava lisið bræv títt dagfest 15. mai. Somuleiðis kendist tað hugstoytt at frætta í útlandinum, at SVF í Degi og Viku hevði borið tey tíðindi, at floksstjórn Tjóðveldisfloksins á fundi viðgjørdi spurningin um val av nýggjum landsstýrismanni.

Eg spurdi meg sjálvan, hvør stendur aftan fyri tað, sum nú fer fram í hesum døgum í okkara flokki?

Ein heilt greið avtala varð gjørd, tá eg segði meg úr starvinum. Avtalan varð almannakunngjørd. Tú hevur sjálvur greitt frá hesum í bløðunum og fyri starvsfólkunum á UMMS o.s.fr.

Eg skilji teg soleiðis, at nú skulu vit síggja burtur frá tí brævi, ið løgmaður fekk frá mær tann 28. mars, sum tú og allur tingflokkurin vóru samdir um. Brævið varð lisið upp í tinginum, og flestu fjølmiðlar kunngjørdu hetta bræv.

Men sum longu nevnt, so skal loysnin um, at eg skuldi út á síðulinjuna, meðan kanningin verður gjørd, kveistrast til viks. Tú ásannar í brævi tínum, at løgmaður og tú sjálvur hava ábyrgdina av, at kanningin kom so seint í lag. Men tann, sum skal revsast fyri tykkara seinking av kanningini, eri eg: Tað gula kortið, ið eg havi fingið, skal skiftast út við tað reyða.

Tað kløkkar og órógvar meg, at lyfti, ið tú hevur givið mær, ætlar tú ikki at halda.

Tað er hugstoytt at staðfesta, at ætlan tín er at fáa tingflokkin at broyta støðutakan sína, og at tú ert farin gjøgnum floksstjórnina við málinum, fyri síðani at leggja tað fyri tingflokkin.

Eg skal upplýsa tær, at eg haldi meg til ta niðurstøðu, ið vit komu til á fundinum 28. mars.«

Eg endi brævið við hesum orðum:

»Góði Høgni, eg haldi, at tú ert í ferð við at fremja ein vandamiklan leik, ið ikki bert fer at skaða teg og meg, men allan flokkin. Við hesum leiki leitar tú tær eftir nýggjum trupulleikum, ið fara at kosta nógv meira, enn tú grunar.

Hetta skal ikki skiljast sum nøkur hóttan, hetta verður sagt fyri at steðga tær at vaða longur út.

Blíðar heilsanir
Signar á Brúnni
(Endurgevingin liðug)

Hóast hetta skriv og hóast mangar viðtalur okkara millum, so helt Høgni fram í tí leiki, hann nú hevur framt. Tá hann nú sigur, at Signar hevði góðkent hansara leiklut, so veit hann betur.

Tað eru nógvir aðrir spurningar, ið eg reisi í mínum brævi til hansara, men ætli eg at steðga við teimum á hesum sinni.

# Veit høgra hond, hvat vinstra ger?

**Birgir Mohr, Sandi**

Hvørki danir ella føroyingar skilja nú logikkin hjá samgonguni!

Innanfyri eina viku hevur Føroya landsstýri skrivað til donsku stjórnina og frábiðji okkum 356 milliónir krónur fyri ár 2002, tí vit eru so ómetaliga væl fyri fíggjarliga – alt gongur við yvirskoti. Samstundis hevur sama landsstýri sent ein av sínum landsstýrismonnum til somu donsku stjórn at samráðast um yvirtøku av Vága floghavn, men fyri at biðja danir gjalda kr. 200 milliónir fyri útbyggjan v.m. av hesum flogvølli, tí vit ikki makta tað fíggjarliga sjálvir.

Hvar er logikkurin í hesum handlingum, sum mótsiga sær sjálvum?

Eitthvørt virki, húsarhald ella fólk við vanligum skili aftanfyri hevði funnið út av, at gjørt ábøturnar á floghavnina í Vágum fyri 200 milliónir kr. fyri síðan at biðja donsku stjórnina lækka blokkin við kr. 356 milliónum minus kr. 200 milliónum = 156 milliónum í ár 2002! Men tað evnar Føroya Landsstýri ikki. Sigur seg hava fingið kravboð frá síni egnu samgongu á Føroya Løgtingi?

Óneyðugt er at nevna, at landskassin skyldar statskassanum umleið kr. 4 milliardir, samstundis sum okkara landsstýri av óforstáiligum orsøkum frásigur okkum kr. 356 milliónir?

Hettar er fíggjarpolitikkur á hægsta støði, tað skilja bert eingi vanlig fólk, hvørkin her ella í Danmark. Hettar er hugmóð, býttheit ella misskiltur stoltleiki, so tað forslær. Og hettar kemur okkum øllum á hesum klettum aftur um brekkur í gráum kálvskinni, tað er vist.

Okkum tørvar ein annan politikk – tí í Tinganesi í løtuni veit høgra hon ikki, hvat vinstra hond ger.

Hettar er sama løgtingssamgonga og landsstýri sum sigur okkum frá, at ikki er ráð til at gera ábøtur á hvørkin skúlaskipan, heilsuskipan, almannaskipan, eftirlønarskipan, íbúðarneyðina ella nakað annað?

Hettar er bert fyrsti avdráttur uppá LOYSINGINA. Føroya fólk eigur annað og betri uppiborið.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# ÅNDERNES MAGT
## - spiritismen i SvF (2 af 2)

*Peter O.K. Olofson*

*Klaksvík*

I den første artikel, så vi nærmere på den moderne spiritismes historie og lære, i denne artikel skal vi se nærmere på fænomenerne i udsendelsesrækken 'Åndernes magt'.

Det er de færreste, der møder spiritismen som en fuldt udformet lære, og vejen ind i spiritismen er som regel ikke en grundig overvejelse af hele den spiritistiske lære. De flestes kontakt med den spiritistiske livsforståelse sker som regel gennem de spiritistiske fænomener, sådan som vi møder det i udsendelsesrækken 'Åndernes magt'. Det handler om mennesker, der har oplevet et eller andet, og denne oplevelse gives der så en spiritistisk forklaring på. Godtager vi forklaringen, ja, så åbner vi os for en spiritistisk livsforståelse.

Der er ingen tvivl om, at de berørte i udsendelsesrækken, har oplevet noget. Afviser vi menneskers oplevelser, så sår vi dermed tvivl om deres troværdighed, og det er der ingen grund til. Men ét er, at de har oplevet noget, noget andet er den forklaring, der gives på fænomenet, enten når de berørte selv eller andre giver en forklaring. Her kommer vi ikke uden om spørgsmålet om livsforståelse, sandhed og løgn, når vi skal bedømme forklaringen på fænomenet. Er den spiritistiske forklaring på fænomenerne, som vi møder i udsendelsesrækken, virkelig sand, eller finder der en åndelig forførelse sted ?

Vi har altså tre elementer: 1) En oplevelse, 2) en tolkning af oplevelsen 3) en vurdering af tolkningen/forklaringen. Punkt 3 er vigtig, da vi ellers forføres.

### Oplevelse, tolkning og bedømmelse

1)Vi har ingen grund til anfægte, at de berørte har oplevet noget.

2) Når vi skal tolke eller forklare et fænomen, kan vi komme til den slutning, at vi ikke kan give nogen forklaring på fænomenet. Der er intet flovt ved, at vi ikke kan give en forklaring, og det, at vi ikke kan give en forklaring, betyder ikke, at vi så er tvunget til at overtage den forklaring, spiritisterne giver. Men gives der en forklaring eller tolkning, så må den bedømmes ud fra Bibelen. Den spiritistiske forklaring i udsendelsesrækken er altså, at afdøde forårsager disse forstyrrelser, og at særligt egnede mennesker, medier, kan komme i kontakt med de afdøde eller lade sig bruge til at komme i kontakt med de afdøde (som med den afdøde tyske læge, der skulle bruge det engelske medie som instrument), og gennem denne kontakt kan de afdøde hjælpes videre, så de forstyrrende fænomener ophører.

3) Hvordan må vi da som kristne vurdere den spiritistiske forklaring ?

### Efter døden

Hvad sker der, når et menneske dør ? Det er det særlige ved mennesket, at det er skabt i Guds billede, og Gud har lagt evigheden i vore hjerter. Når et dyr dør, så holder det op med at eksistere, men når et menneske dør, holder det ikke op med at være til. Selv i døden opholder Gud sin skabning. Derfor taler Guds Ord f.eks. om "de ånder, der var i forvaring" (1 Pet 3,19). Når et menneske dør, adskilles sjæl og legeme. De gamle grækere mente, at nu blev sjælen befriet fra legemets fængsel (og spiritisterne ligger i sidste ende på linie hermed). Men ifølge Guds Ord er legemet ikke et fængsel for sjælen, for det er det hele menneske, sjæl og legeme, der er skabt i Guds billede. Det er fordi, at synden kom ind i verden og med synden døden, at et menneskes legeme ved døden lægges i graven, mens sjælen er i dødsriget indtil opstandelsens morgen. Da skal sjæl og legeme genforenes. Alle, både troende og vantro, skal opstå (Daniel 12,2; ApG 24,15). Jesus siger: "Den time kommer, da alle de, der er i gravene, skal høre hans røst, og gå ud af dem - de, der har øvet det gode, for at opstå til liv, men de, der har gjort det onde, for at opstå til dom" (Joh 5,28-29). Da er den gamle verdenshusholdning slut. De frelste skal leve evigt under Guds nåde på den nye jord. De fortabte skal evigt være under Guds vrede i Helvedet.

I mellemtilstanden, altså i tiden mellem vor død her på jorden og Jesu genkomst, skal de fortabte erfare en forsmag på evigheden under Guds vrede, og de frelste erfare en forsmag på evigheden under Guds nåde (jfr. Luk 16,19ff; Luk 23,43; Fil 1,23).

### Kontakt til de afdøde

Er det rigtigt og muligt at kontakte de afdøde ? Først må vi sige, at det klart er en overtrædelse af Guds bud overhovedet at forsøge (5 Mos 18.9-14; 3 Mos 19,31 & 20,6; ApG 19,19; Gal 5,20). Dernæst fremgår det klart af fortællingen om den rige mand og Lazarus, at de afdøde ikke kan kontakte os og omvendt. Det er en menneskelig umulighed. Derfor skriver Paulus også i 1 Thess 4,13-15: "Brødre, vi vil ikke, at I skal være uvidende om dem, der sover hen, for at I ikke skal sørge som de andre, der ikke har noget håb. For så sandt som vi tror, at Jesus døde og opstod, vil Gud også ved Jesus føre de hensovede sammen med ham. For det siger vi jer med et ord af Herren: Vi, der lever og endnu er her, når Herren kommer, skal ikke gå forud for de hensovede. For Herren selv vil, når befalingen lyder, når ærkeenglen kalder og Guds basun gjalder, stige ned fra himlen, og de, der er døde i Kristus, skal opstå først. Så skal vi, der lever og endnu er her, rykkes bort i skyerne sammen med dem for at møde Herren i luften, og så skal vi altid være sammen med Herren. Trøst derfor hinanden med disse ord."

### Under dæmoniske indflydelse

Det er ikke vore døde, de spiritistiske medier får kontakt med, men det er dæmonisk indflydelse, de giver sig ind under. Er de oplysninger, de så giver, korrekte eller ej ? Det er ikke det afgørende. Det er rent faktisk underordnet. Bedømmelse af den spiritistiske praksis står og falder ikke med, om oplysningerne, som medierne giver, er korrekte eller ej. Dæmoner er ikke altvidende, det er kun Gud, men dæmonerne beskrives med viden (Mark 1,24), følelse (frygt) (Mark 1,24), evnen til at tale (Matt 8,31) og vilje (Matt 12,44). Spiritismens historie er blandt så meget andet en lang historie om tilsyneladende forbløffende overnaturlige fænomener, der langs ad vejen er blevet afsløret som bevidst eller ubevidst bedrag (snyd), hvilket bl.a. den såkaldte parapsykologiske forskning har påvist (en forskning, der dog i sit udgangspunkt, er åben for en mulig okkult tilværelsesforståelse). Det afgørende er altså ikke, hvorvidt visse spiritistiske fænomener har en naturlig forklaring eller ej, men at den spiritistiske praksis og lære, er en del af de onde åndsmagters virke i denne faldne verden. Det er disse magter, de spiritistiske medier giver sig under og som der åbnes for, når mennesker bruger disse medier og de spiritistiske teknikker.

### En kristen under beskyttelse

Den gamle biskop for Færøerne, Peder Madsen, skriver: "Djævelens Magt over menneskene formidler sig gennem Synden og når netop så langt som Syndens og Dødens. Deri ligger, at den er brudt ved Kristus (Mt. 12,28-29); Lk. 10,18; Jo. 12,31; Kol. 2,1; Joh. 3,8), saa Indlemmelsen i Sønnens Rige er Befrielse fra Mørkets Magt (Kol. 1,13; Act. 26,18). Vel vedbliver han at modarbejde Guds Rige (Mt. 13,19; Lk. 22,31; 1. Tess. 2,18; Apok 2,10), saa også Guds Børn maa være paa vagt mod hans Fristelser (Ef. 6,12; 1. Pet. 5,9), men han er afmægtig overfor enhver, som i Troen holder fast ved den store Sejrherre, som én gang for alle har overvundet ham, og for hvem han altid maa fly (Ef. 6,10-11; 1. Pet. 5,9) (jfr. Den gamle Tale om, at Djævelen maa fly for Korsets tegn). Guds Børn er altid i den himmelske Faders Haand, og han mager det altid saaledes, at de ikke fristes over Evne (1. Kor. 10,13)."

En kristen er værnet og beskyttet af ham, der har overvundet Djævelen og alle hans dæmoner. Oplever vi såkaldte uforklarlige ting, der kan være en plage, sådan som de berørte i udsendelsesrækken 'Åndernes magt' oplever, så er vejen frem ikke at tage spiritismens forklaring til sig eller at bruge spiritistiske medier, det er kun at gøre ondt værre. Vejen frem er at holde sig til Jesus, følge ham, bede til ham og i Jesu navn lade Guds Ord fælde Satan og dæmonerne, sådan som det siges i salmen: Vor Gud han er så fast en borg.

*Og myldred djævle frem på jord*
*og os opsluge ville,*
*vi frygter dog ej fare stor,*
*de deres trusler spilde;*
*lad rase mørkets drot*
*med løgn og mord og spot,*
*han har dog få't sin dom,*
*da Krist til jorden kom,*
*et ord ham nu kan fælde.*




